tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Yvirkskot og Landssjúkrahúsið

## *Oddagrein*

ABSURD er orðið, ið sigur alt um støðuna á okkara høvuðssjúkrahúsi, Landssjúkrahúsinum. Hvussu ber tað til, at føroyska samfelagið, sum í hesum árinum hevur eina fíggjarlóg, ið hevur fleiri hundrað milliónir kr. í yvirskoti, ikki hevur ráð til at at eitt vælvirkandi høvuðssjúkrahús - hvussu ber tað til, at tað skal verða neyðugt á hvørjum ári at niðurberja hetta sjúkrahúsið, soleiðis at allir føroyingar verða taparar? Taðhevur víst seg at vera ein afturvendandi trupulleiki á hvørjum ári, at tað mangla pengar í rakstrinum á Landssjúkrahúsinum. Síðani skerjingarnar á hesum so týðandi parti av heilsuøkinum byrjaðu og tóku dik á seg fyrst í 90-unum hava teir ymsu starvfólkabólkarnir á Landssjúkrahúsinum livað í óvissuni. Sama kann eisini sigast um hini smærri sjúkrahúsini.

VIT loyva okkum at spyrja í hvønn mun tað kann vera tann ósjónliga útjaðarasamgongan, sum er orsøkin til, at tað ikki ber til at játta okkara høvuðssjúkrahúsi so mikið av pengum, at tað kann virka sum eitt nútíðar sjúkrahús fyri allar borgarar í samfelagnum? Tað er eingin loyna, at tað eru løgmaður og fíggjarmálaráðharrin, sum sita á kassanum í Tinganesi og tí eru teir, ið gera av, hvussu nógvir pengar skulu játtast til eitt nú Landssjúkrahúsið. Nú so stórt yvirskot er á fíggjarlógini eigur at verða spurt, hví tað ikki ber til at loysa trupulleikarnar á Landssjúkrahúsinum, sum í síðsta enda botna í, at alt ov nógv verður lagt á hvørt starvsfólkið. Uppsøgnir hava rætt og slætt skapt ein ótryggleika, sum eingin kann liva við í longdini. Tær eru orsøkin til, at deildir mugu stongja, at fólkið má renna skjótari osfr. Í veruleikanum áttu fleiri fólk verið sett á Landssjúkrahúsinum, soleiðis at tað bar til at liva upp til krøvini, sum eitt samfelag setir til sítt høvuðs/meginsjúkrahús. Men tað sær ikki mætari út enn, at okkara ráðandi politikarar vilja als ikki hava eitt vælvirkandi landssjúkrahús. Tað er ikki ov nógv sagt, at Landssjúkrahúsið næstan ongan góðan eigur millum okkara politikarar. M.a. er tað eisini undrannarvert, at andsstøðupolitikarar og fyri tað eisini samgongupolitikarar valdir í høvuðsstaðnum, mest sum bara lata standa til.

TAÐ er ein politisk avgerð, at vit skulu hava trý sjúkrahús í Føroyum. Spurningurin er so, um vit skulu hava trý sjúkrahús, har einki livir upp til krøvini, sum nútíðarsamfelagið setir til eitt sjúkrahús ella vit skulu hava í hvussu er eitt høvuðssjúkrahús, sum livir upp til hesi krøvini. Teir politikarar, sum hava gjørt av og krevja, at vit skulu hava trý sjúkrahús mugu so eisini gera sær greitt, at høvuðssjúkrahúsið má og skal prioriterast hægri enn tað verður gjørt í dag. Hetta vil í veruleikanum siga, at antin mugu hini sjúkrahúsini niðurprioriterast ella mugu fleiri pengar finnast aðrastaðni til røkt og viðgerð og menning av hesum sjúkrahúsinum. Tað er absurt at hava eitt yvirskot á fíggjarlógini uppá fleiri hundrað milliónir, samtíðis sum landsins meginsjúkrahús ikki fær pengar til at kunna veita neyðugu tænastuna til allar landsins borgarar. Í okkara verð hava løgmaður, fíggjarmálaráðharrin og heilsumálaráðharrin fullu ábyrgdina av hesi vanvirðiligu gongd. Hvat hevur t.d. heilsumálaráðharrin gjørt til tess at sannføra sínar starvsfelagar í Tinganesi um, at Landssjúkrahúsið má prioriterast hægri? Hví góðtók hon uttan víðari, at stórur partur av lønarhækkingunum skuldi takast frá rakstrinum. Hví setti fíggjarmálaráðharrin hetta krav, tá hann visti, hvørjar avleiðingar tað fór at fáa fyri sjúkrahúsøkið?

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# William í naknari kvinnu



Hetta má eitast at líkna føroysku útgávuni av søguni hjá H. C. Andersen um nakna keisaran og hansara vøkru klæðir.

Nú vit hava hoyrt øll tey føgru orðini um standmyndina, sum reist er yvir okkara mætasta skald nakrantíð og kanska til allar tíðir, William Heinesen, runnu fleiri onnur hugskot fram fyri meg, sum eftir míni metan høvdu verið meiri ærulig og vandalig hugskot. Minnist sjálvur frá 70-unum og 80-unum, tá ið eg starvðist í Havn, at eg tíðum rendi meg í William og Lisu í Plantasjuni.

Hetta er ein minnilig og ógloymandi sjón og hon stendur fyri mær enn sum ein virðiligur varði um hesi megnar fólk, har eg síðan serliga havi lært Lisu at kenna.

At reisa einum so mætum og kendum manni ein sovorðnan varða í býi, har hann sjálvur hevur verið heiðursborgari, eitt, sum eg til ongar tíðir fari at fata. Álvaratos, hvør verður standmyndin yvir Bill Clinton, kundu vit í spølni spurt, men hetta spølni er kortini ikki so fjart og grunt?!

Síggi fyri mær fyrstu løtuna, tá ið eg og dóttirin fara spákandi gjøgnum Plantasjuna og vit koma til hesa standmynd.

Hon spyr:
- Babba, hvat er hetta?
- Ein standmynd, svari eg.
Hon spyr:
- Ein standmynd?!
- Ja, er hon ikki vøkur, svari eg.
Hon spyr:
- Ein standmynd av hvørjum?!
- Av langabba tínum! svari eg og havi hug at hyggja burt.

**Ólavur í Beiti**
**rithøvundur**

# Javnaðarloysing undir hentleikaflaggi

Vit fáa í hesum døgum at vita, frá bæði bløðum, útvarpi og eisini beinleiðis frá landsstýrinum, at samráðingaruppleggið mótvegis dønum, er um at vera klárt at senda til uttanlandsnevndina.

Tað er við hesum samráðingaruppleggi, at landsstýrið skal, at skipa Føroyar sum fullveldi, - tað vil siga at loysa úr ríkisfelagsskapinum — júst sum løgtingið longu hevur samtykt.

Samstundis síggja- og hoyra vit í fjølmiðlunum, at Javnaðarflokkurin ikki útilokar, at taka undir við samráðingaruppleggínum hjá landsstýrinum. Og hetta er høvuðsorsøkin til, at uppleggið nú er klárt.

**Tveir kaffifundir**
Eg loyvdi mær í eini viðmerking til hesi stórtíðindi at vísa á, og harmast um, at bert tveir sokallaðir kaffifundir skuldu til, fyri at fáa Javnaðarflokkin at taka undir við fullveldisætlanini hjá landsstýrinum.

At meta eftir tí, sum staðið hevur í bløðunum, og hevur verið at hoyrt annars, so eri eg ikki tann einasti, sum havi fata undirtøku Javnaðarfloksins til fullveldisuppskotið soleiðis.

Tey stóru bløðini hava skilt tað soleiðis, og Útvarpið hevur eftir øllum at døma gjørt tað sama.Og fyri at eingin føroyingur skal vera í iva um, hvat Javnaðarflokkurin nú er í ferð við at gera, so hevur okkara stórmeistari í karekaturtekningum, Óli Petersen, eina so sera greiða og rámandi mynd á baksíðuni í Sosialinum, hósdagin 13 január. Har síggja vit ein blindan mann fara so beint í eitt kolasvart hol.

Henda tekning lýsir nógv betur enn orð kunnu gera tað, hvat tað er, sum formaður Javnaðarfloksins nú er vassaður út í.

**Veðurhanin melur enn**
Nei Javnaðarflokkurin er so sanniliga ongantíð farin í baklás. Allir føroyingar hava uppliva, hvussu flokkurin hevur vinglað í hesum málinum, sagt eitt í dag og annað í morgin.

Eg havi fyrr samanborið formannin við ein valsmurdan veðurhana, sum alla tíðina snarar við ættini. Eftir valið tóku baði núverandi- og ein fyrrverandi formaður Javnaðarfloksins undir við tí partinum av samgonguskjalinum, sum snúi seg um fullveldi. Seinni, tá ið veljarakanningar vístu, at størsti parturin av føroyingum ikki vildu hava loysing, kúgvendi flokkurin aftur. Nú hevur loysingin fingið hentleikaflagg innanfyri ríkisfelagsskapin.

Taktikkurin hjá loysingarflokkunum sær út til at eydnast. Trýst á formannin í Javnaðarflokkinum, og hann gerst moyrur.

**Neyðsemja**
Spennandi verður nú at síggja, um løgtingssamtyktin um, at Føroyar skulu



skipast sum land við fullveldi, verður broytt til eina loysn, sum liggur innanfyri ríkisfelagsskapin. Tað má væl saktans verða ein náttúrlig fylgja, um nakað samsvar skal vera ímillum ætlan og ger hjá Javnaðarflokkinum.

Í grein í Sosialinum leygardagin, finst formaður Javnaðarfloksins at uppskoti Sambandsfloksins til nýðskipan av ríkisviðurskiftunum. Sambandsuppskotið er ein nýmótansgerð av viðurskiftunum í ríkisfelagsskapinum, sum vit hava kent tey, seinastu 50 áirni, ímeðan javnaðaruppskotið av serfrøðingum verður sagt, hvørki at líkjast fugli ella fiski.

**Sambandsflokkurin verjir ríkisfelagsskapin**
Formaður Javnaðarfloksins sigur, at Sambandsflokkurin fór í baklás fyri skjótt 100 árum síðani.

Hetta skal helst skiljast soleiðis, at Sambandsflokkurin enn sum áður heldur fast um — og hevur vart ríkisfelagsskapin, og ikki vil taka undir við loysingarætlanini hjá landsstýrinum.

Hetta er púra rætt. Meðan Javnaðarflokkurin og aðrir flokkar, tey seinastu árini hava víst á alt frá sjálvstýrislóg til skipaða loysing, so hevur Sambandsflokkurin staðið klettafastur. Vit í Sambandsflokkinum vilja hvørki hava skipaða- ella óskipaða loysing.

**Vilja samarbeiða**
Lat tað verða sagt beinan vegin. Vit í Sambandsflokkinum vilja fegin samarbeiða um eitt nýskipanaruppskot. Eina dagføring av viðurskiftunum, sum leggur upp til greiðar reglur millum ríkispartarnar, og sum setur kós inní framtíðina. Har sum Føroyar, sum vælferðarsamfelag eisini fáa lut í altjóða menningini og altjóða samfelagnum, og har sum ríkisfelagsskapurin er motorvegurin inní framtíðina.

Men vit í Sambandsflokkinum harmast framvegis um, at tað eydnaðist landsstýrinum, eftir bert tveir kaffifundir, at fáa Javnaðarflokkin at ganga við til fullveldisætlanina. Vit harmast um, at tað ikki saman við Javnaðarflokkinum, eydnaðist andstøðuni at geva samgonguni neyðuga mótspælið, sum krevst, fyri at varðveita ríkisfelagsskapin. Ein ríkisfelagsskap, sum vit kenna hann, við teirri trygd, rættindum og skyldum, sum náttúrliga fylgja við.

**Edmund Joensen**




# Føroya Banki setur dám á myndina

Sum myndin vísir, vaks samlaða yvirskotið hjá vinnuni úr 570 mió. kr í 1997 til 890 mió. kr í 1998. Um bankin ikki verður tikin við, vaks yvirskotið úr 227 í 1997 mió. kr til 584 mió. kr í 1998. Í tíðarskeiðnum 1996 til 1998 fall yvirskotið hjá vinnuni 13% frá 1996 til 1997, meðan tað øktist heili 158% frá 1997 til 1998.



# Løgmaður góðtekur ikki støðuna

*— At stovnsleiðari ferð eftir ferð er í fjølmiðlunum við avgerðum og tekur landsstýrið sum gísla, fái eg ikki góðtikið, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður*

ÓLAVUR Í BEITI

Landsstýrisfundur var fríggjadagin og vóru eisini seinastu rembingarnar viðvíkjandi teimum mongu uppsøgnunum, sum skuldu verða á sjúkrahúsøkinum. Seinastu dagarnar hevur støðan verið soleiðis háttað hjá mongum, sum starvast á sjúkrahúsøkinum, at eingin hevur kent seg tryggan, tí fráboðanir eru komnar dagliga frá ymiskum síðum.

Stovnsleiðarin á Landssjúkrahúsinum, Jákup Mørkøre, hevur sagt fólk úr starvi, meðan landsstýrismaðurin, Helena Dam á Neystabø, hevur sett tey í starv aftur annan dagin, og tað er einki at siga um, at hetta hevur gjørt støðuna á arbeiðsplássinum sera ótrygga og óunniliga.

### Fær fylgjur

Ógreitt er enn at siga, hvør avleiðingin verður av øllum hesum rembingum, men løgmaður Annfinn Kallsberg sigur við Sosialin, at hann góðtekur ikki støðuna. Hvørjar fylgjur hetta skal fáa er so avgerðin hjá landsstýrismanninum, men eg meti hetta sum sera álvarsamt mál, sigur Annfinn Kallberg.

– At stovnsleiðari ferð eftir ferð er í fjølmiðlunum við avgerðum og tekur landsstýrið sum gísla, fái eg ikki góðtikið, og sum støðan er nú, fái eg ikki sagt meiri, sigur løgmaður.

Og tað er einki at ivast í, at soleiðis sum støðan hevur verið seinastu dagarnar við hópuppsøgnum ein dag, og hópsetanum annan dag, er ikki nakað, sum ein stjórnaleiðari fær góðtikið. Um tað so fær fylgjur fyri almanna- og heilsumálaráðharran ella stovnsleiðaran, er ikki lætt at siga, men sambært orðunum hjá løgmanni um, at hann góðtekur ikki støðuna, so má hetta fáa fylgjur. Starvsfólkini krevja tað og fakfeløgini krevja tað eisini.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður, góðtekur ikki støðuna á Landssjúkrahúsinum*

# Stak væl nøgdir við sjúkrabilatænastuna

*Kommunulæknarnir í Eysturoynni gera vart við, at teir er stak væl nøgdir við sjúkrabilatænastuna, so sum hon hevur virkað seinastu 11 árini*

Kommunulæknarnir í Eysturoynn gera vart við, at teir eru stak væl nøgdir við sjúkrabilatænastuna, sum hevur virkað í oynni seinastu 11 árini

— Vit fara at heita á tann fyrisitingarliga og politiska myndugleikan at hugsa seg væl um, áðrenn broytingar verða gjørdar, soleiðis at tænastustøðið fyri teir 11.000 borgararnar í økinum ikki versnar, og óneyðugur ótti og ótryggleiki verður skaptur, siga kommunulæknarnir

— Vit gera vart við, at núverandi tænasta verður røkt av vælútbúnum fólki við áralangum royndum og sum hava røkt sítt starv samvitskufult og við sera stórum áhuga.

Kommunulæknarnir gera vart við, at ein lækkan av tænastustøðinum á hesum øki samstundis vil gera arbeiði teirra truplari og harvið truplari at fáa kommunulæknar at leggjast afturat og støðast í økinum.

— Vit meta eitt øki við 11.000 borgarum og munandi fjarstøðu frá sjúkrahúsi hevur sín sjálvsagda rætt at hava eina vælvirkandi ambulansutænastu – røkta av fólki við hollari útbúgving og royndum.

Skrivað undir skrivið hava:

Pól Jóhs í Horni, kommunulækni í Fuglafirði
Andrias Petersen, kommunulækni í Gøtu
Kári Rasmussen, kommunulækni í Runavík
Sverri Lamhauge, kommunulækni í Runavík
Hálvdan Simonsen, kommunulækni á Skála
Magnus á Stongunum, kommunulækni á Eiði



*Kommunulæknarnir eru væl nøgdir við tænastuna*

# Samráðingaruppleggið til viðgerðar týsdagin

*Innikhaldið í samráðingaruppelegginum um ríkisrættarligu støðuna varð í gjár viðgjørt á landsstýrisfundi. Uttanlandsnevndin fer helst undir viðgerðina týsdagin*

JOHN JOHANNESSEN

Sokallaða politiska prosessin í málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya endar mikudagin. Tá verður samráðingaruppleggið liðugt orðað og málið fer í uttanlandsnevndina, har viðgerðin byrjar týsdagin, gongst alt sum ætlað.

Landsstýrið skal í dag hava fund við Miðflokkin og samgongulimirnar í uttanlandsnevndini um málið, og mikudagin verður fundur við Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Hetta, verður sambært Høgna Hoydal, gjørt fyri at enda politisku prosessina á ein góðan hátt.

### Semja ávegis

Greiðar ábendingar hava seinastu tíðina verið um, at nú er farið at nærkast millum samgonguna og Javnaðarflokkin í málinum. Men Javnaðarflokkurin hevur meldað út, at treytin fyri, at hann er við, er, at talan verður eitt samráðingarupplegg, ið leggur upp til ein felagsskap Føroyar og Danmarkar ímillum.

Hetta gevur ábendingar um, at talan ikki longur er um beinleiðis loysing frá Danmark, men um eina loysn, ið liggur onkustaðni ímillum verandi ríkisrættarligu støðuna og loysing. Tó ber ikki til at fáa nakað nágreiniligt at vita enn. Landsstýrið vil nevniliga ikki gera viðmerkingar til innihaldið í samráðingaruppelegginum.

Sambært Høgna Hoydal, landsstýrismanni, var tað høvuðsinnihaldið í ritinum, sum skal í uttanlandsnevndina, ið varð viðgjørt á landsstýrisfundinum í gjár. Men fyri at tað skal bera til at gera broytingar, verður innihaldið ikki latið uttanlandsnevndini fyrr enn eftir fundirnar mikudagin, tá politiska prosessin er liðug.

### Skal fáa góða viðgerð

Hergeir Nielsen, formaður í uttanlandsnevndini, sigur, at um samráðingaruppleggið verður nevndini í hendi áðrenn týsdagin, er tað heilt vist, at hol verður sett á málið týsdagin, ið er regluligur fundardagur hjá nevndini. Sum støðan er nú, roknar hann við, at hetta verður veruleiki, og lovar hann, at málið skal fáa eina góða viðgerð.

– Hetta er týdningarmiklasta málið, ið nakrantíð er viðgjørt í nakrari føroyskari nevnd, og tí er viðgerðin ein stór avbjóðing, men eg skal nokk gera mítt til, at talan verður um eina góða viðgerð, sigur hann.

# Fleiri onnur mál

JOHN JOHANNESSEN

Umframt viðgerðina av uppritinum um komandi samráðingar við donsku stjórnina vóru eisini fleiri onnur mál viðgjørd á landsstýrisfundinum í gjár.

Málið um føroyskan virðisbrævamarknað, sum Landsbankin leingi hevur arbeitt við, varð eisini viðgjørt, somuleiðis, sum uppskotið til løgtingslóg um broyting í kolvetnisskattalógini eisini var til viðgerðar.

Leingi hava ætlanir verið um at tappa og selja vant úr Sumbiarbergholinum, men hesar ætlanir hava ikki verið framdar í verki, tí ivasamt hevur verið, hvør hevur rættindini til vatnið, ið kemur innan úr fjallinum. Hetta mál varð eisini viðgjørt á landsstýrisfundinum í gjár.

Seinast á skránni fyri landsstýrisfundin varð viðgerð av, um málsøkið Sjúkrasystraskúli Føroya skal flytast frá Almanna- og Heilsumálastýrinum

